Kommunufelagið

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
28. august 2023

Okkara j.nr.
23/04965-8

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
23/12042

**Ummæli – Uppskot til kunngerð um at gagnnýta grundvatn**

Felagið fekk 1. august 2023 omanfyrinevnda uppskot til ummælis. Uppskotið er viðgjørt í stýri okkara, sum hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

Uppskotið snýr seg grundleggjandi um at seta karmar kring málsviðgerðina av løgtingslóg um grundvatn. Hendan málsviðgerð skal fara fram hjá Jarðfeingi, og Kommunufelagið hevur tískil ikki innihaldsligar viðmerkingar til kunngerðina.

Felagið vil kortini vísa á, at møguligar boringar eftir grundvatni til gangnýtslu til orkuendamál v.m. kunnu hugsast at hava við sær neyvt somu avbjóðingar sum hava víst seg í sambandi við jarðhitaboringar. Verður loyvi givið til nýggjar boringar við heimild í løgtingslóg um grundvatn, so er eftir tað eftir okkara tykki ógvuliga týdningarmikið, at hetta fer fram á ein skipaðan hátt.

Saman við viðkomandi landsmyndugleikum hevur Kommunufelagið í summar verið við í einum arbeiði, sum millum annað hevði til endamáls kanna møgulig skaðilig árin av jarðhitaboringum og tryggja neyðugu heimildirnar í hesum sambandi – herundir krøv um fyribyrgjandi átøk, áðrenn farið verður undir at bora. Mælt verður til, at hetta arbeiðið verður grundarlag undir at tryggja hóskandi heimildir og mannagongdir eisini á hesum øki, soleiðis at grundvatnsboringar verða fevndar av samsvarandi reglum og krøvum.

Kommunufelagið mælir sostatt til, at grundvatnsboringar verða lagdar í somu karmar, sum jarðhitaboringar – við greiðum heimildum og føstum mannagongdum fyri at seta sakligar treytir við øll boriloyvi. Felagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri